## Balazs um Moniku

Eg havi stjórnað nógvum orkestrum og lurtað eftir mongum violinistum, men eingin er sum Monika. Nógvir violinistar duga tekniskt sera væl, og teir spæla alt perfekt, men tá konsertin er liðug, minnist tú ikki rættiliga, hvussu tað ljóðaði. Tað er eitt sindur líka mikið. Soleiðis er ikki við Moniku. Hon spælir við hjartanum, og tú gloymir ikki hennara spæl aftaná. Eg eri ótrúliga stoltur av, at Monika hevur spælt mínar sonatur, sum eru sera innviklaðar og torførar. Ongin hevur spælt tær so væl sum hon.



## Føroyar sum turistattraktión

Frederic Balazs visti ikki hvar Føroyar vóru, og hann mátti finna sær eitt verðinskort fram, tá hann varð boðin at spæla við Summartónum í 1998. Hann er ótrúliga hugtikin av landinum, huglagnum og føroyska sinnalagnum, og hann skilur ikki, at ikki fleiri fólk vitja hetta fantastiska landið. Men hetta er kanska í ferð við at broytast, heldur hann, tí stutt síðani hevur hann sæð tvey stór amerikansk bløð, sum høvdu Føroyar sum høvðussøgu í ferðasektiónini.

# Leirvík er líka gott sum Los Angeles

**87 ára gamli Frederic Balazs var orkesturleiðari hjá næststørsta symfoniorkestrinum í Ungarn sum 17 ára gamal. Síðani seinna veraldarbardaga hevur USA verið hansara heimland, og hann hevur spælt violin og stjórnað orkestrum um allan heim. Men onki er sum í Leirvík, sigur hann**



- Føroyar eru
ótrúliga hugta
hevur havt ei
Mynd: Jens K

## Tónleikari




**Dorit Hansen**
dorit@sosialurin.fo
Myndir: Høgni Thomsen


Er hetta veruliga eitt miðlahús, spyr Frederic Balazs, sum vit seta okkum niður til eitt prát inni í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Tað er fríggjadag seinnapart, og húsið er eitt sindur stilt. Frederic Balazs, sum er vanur við amerikanska meldurin og hevur vitjað amerikanskar tíðindastovur, fær seg ikki at trúgva, at hetta er eitt blaðhús.

- Føroyar eru ein perla. Hóast tit eru partur av heiminum, so eru tit so heilt øðrvísi, og tað er ótrúliga hugtakandi, sigur 87 ára gamli amerikanski komponisturin, sum eisini hevur verið tónleikari og dirigentur megin partin av lívinum.

Hann er í Føroyum og vitjar Moniku Stauss Joensen úr Leirvík, sum hann kom at kenna í 1998, tá Summartónar høvdu Amerika sum tema, og tey høvdu valt nakrar sonatir, sum hann hevði skrivað. Tey bjóðaðu honum at vera við, og hann gjørdist so hugtikin av Føroyum, føroyingum og Moniku, at hann avgjørdi at hann mátti koma aftur.

- Tað var eitt sindur illa fyrireikað av mær tað summarið, greiðir Monika frá.

- Tað passaði seg so, at eg var sett at eiga samstundis, sum vit skuldu hava okkara seinastu konsertir. Men eg vildi ikki avlýsa, tí nú vóru konsertirnar tilrættalagdar og Frederic Balazs hevði játtað at vera við. So tá vit fóru til tað seinastu konsertina í Útvarpshøllini, tók eg barsilstasku við, tí eg var vís í, at eg fór at eiga tað kvøldið, flennir Monika.

- Ja, hon spældi eisini eitt sindur skjótari enn vanligt, sigur Balazs við einum skeivum smíli.

- Eg kláraði næstan ikki at fylgja við, tí hon spældi til sparkirútmuna hjá barninum í búkinum.

Í dag er barnið í búkinum 9 ára gomul og eitur Deborah. Og Balazs hevur glett seg at heilsa uppá hesa fittu gentu, sum var við til allar konsertirnar fyri níggju árum síðani, men sum ikki kom út, fyrr enn hann var farin avstað aftur.

### The American Dream

Hesin blíði og ikki sørt skemtingarsami maðurin hevur havt eitt langt og spennandi lív, og hóast hann í dag er 87 ára gamal, er tann orka og tað framfýsni, sum hevur ført hann so víða, framvegis týðuligt í hansara lætta gongulagi, føstu eygum og avslappaða klæðnastíli.

Hann byrjaði at spæla violin sum fimm ára gamal, og tá hann greiðir frá sínum lívi, ljóðar tað sum nógv er hent av tilvild, men frásøgnir hansara vísa eisini, at hann hevur loftað teimum møguleikum, sum hann hevur fingið.

- Eg og ein vinmaður stóðu og



*Frederic Balazs skipaði fyri nøkrum árum síðani fyri konsertferð í USA hjá Ólavi Jakobsen og Moniku Stauss Joensen. Mánakvøldið spældu tey aftur fyri honum*



*Nógv fólk vóru komin at heiðra Balazs í Bátasavninum. Her prátar hann við Jógvan Gerðalíð um bóndaskap í Føroyum og um hví vit ikki dyrka tomatir her*